**YAMAHA SCOOTARI TIL SØLU**
Vegna keyp av bili er ein seks mánaðar gamal scootari til sølu. Hann er lítið brúktur og hevur bert koyrt 3000 kilometur. Scootarin sær út sum nýggjur. Prísur 19.000 kr. Nýprísur 22.800 kr.
*tlf. 252115 ella 322800*

## Teldur

**FARTELDA**
Targa Visionary Intel PIII, 733 MHz, 128 MB SDRAM, 10 GB Harddisk, 24x CD-Rom drev, 14,1" TFT skerm, 8 MB VGA-kort, PC-kort, Modem, Innbygd 10/100 Mb Ethernet, Infrareytt IrDA 1,1, Touchpad mús + møguleika fyri leysari mús, 16 bit 3D on-board hátalarar. Windows ME, Word 2000 umframt hópin av forritum. 4 ára totalgaranti. Prísur: 14.500
*Tlf. 284607*

**SKANNARI TIL SØLU**
2iTech skannari, sera góður, men riggar bert til Win.95. Gott programm fylgir við. Kr. 500,-
*Tlf. 317504*

**HYGG HER!!!**
Ein X-box við 3 spølum, sum eita: Dead oir Alive 3, Halo og Tony Hawk. Pro skater 3 4.500,- kr. Ring
*Tlf. 264998*

**TELDA TIL SØLU**
1000 mhz, 40 Gb - 256 mb ram, Geforce II 64 Mb. 17" skerm - 8 spøl - Dvix netkort. Ring og gev eitt tilboð.
*Tlf. 257149 Cristi*

**TELDA TIL SØLU**
900 mhz, 40 Gb, 256 mb ram, GeForce 11 32 mb. TV tunermoden 17" skerm-brennari, 8/6/32. Prísuppskot 9.000 kr.
*Tlf. 257149 Christi*

**BRENNARI**
Plextor 12/10/32a brennari til sølu fyri 1000 kr.
*Tlf. 253006*

**TIL SØLU**
InnoVision GeForce2 titanium grafikkort, við 64MB DDR RAM, til sølu fyri 1500 kr.
*Tlf. 253006*

**EIN SEGA**
computari v/ 4 joystikkum og spølum til sølu fyri 800,- kr.
*Tlf. 448439*

## Tónleikur

**PIONEER BILSTEREO**
Komplett Pioneer bilstereo, lítið brúkt og sera gott, til sølu fyri 5.500, nýprísur 13.000 kr.
*Tlf. 318365 ella 226020*

**YAMAHA PSR-620 KEYBOARD**
til sølu. Hevur 150 ljóð, 100 rútmur o.m.a. Sum nýtt. Sustain pedal fylgir við.
*Tlf. 315556, e. kl. 19*

**MARSHALL 8240**
Guitar-forsterkari MARSHALL 8240 stereochorus í góðum standi til sølu. Flightcase kann fylgja við.
*René tlf. 211438*

**FOSTEX**
Multitracker til sølu. Ein 4 sporaður Fostex Multitracker Model X-24 til sølu fyri 3000 kr.
*Tlf. 260590*

**BÍLIGA TIL SØLU**
Eitt gott orgul bíliga til sølu vegna plásstrot.
*Tlf. 311247*

**MIKROFON**
Mikrofon til sang ynskist til keyps.
*Tlf. 264060, e. kl. 16*

**YAMAHA PSR8000**
til sølu til ein og hvønn, ið vil hava tað besta av tí besta innan keyboard! Verður selt um nóg høgt boð fæst!
*Tlf. 442086 ella 448207, Ragnar*

**TÍMAR Á TVØROYRI**
Er nakar, ið kann undirvísa í tvørfloytu? Ring
*Tlf. 321702*

**KICK ASS!**
Saknar tú harðan, øran, tekniskt gjøgnumførdan tungmálms tónleik at runga á føroyska tónleikapallinum, so er hetta møguleikin at gera okkurt við tað! Vit leita eftir guitarisit og bassisti! Ring á
*tlf. 262184 (Magnus) ella 254219 (Terje)*

## Út- & Sjónvarp

**RADIO YNSKIST**
frá umleið 1974 til keyps. Ring vinarliga
*tlf. 319613*

**PARABOLMÓTTAKARI**
Digitalur parabolmóttakari til sølu.
*Tlf. 421074*

## Ymiskt

**Í BÝTI**
Tveir fullir bensintangar ynskjast í býti við tveir fullar rusksekkir. Verða fluttir økeypis á Oyrargjógv.
*Tlf. 333617 í Sandavági*

**ERICSSON T28**
mobiltelefon. Telefonin er næstan heilt nýggj og í orginalari eskju við manualum o.a. Ein sera góð, lítil og lætt telefon. Einans kr. 650,- e-Mail: radey@kallnet.fo
*Tlf. 374059*

**EINA VIKU Í BERGEN?**
Fult møblerað íbúð í Bergen við stak góðum útsýni til leigu í samband við summarsiglingina hjá Norrønu.
*Tlf. 447942*

**TIL SØLU**
Ein massasjubonkur til sølu.
*Tlf. 211555*

**SIEMENS SL45**
Fartelefon. 1 ára gomul, lítið brúkt, ný ístand gjørd fyri stuttum. Hentleikar so sum mp3 spælara, møguleika fyri at taka upp, wap osv. Fyri einans 3000 kr, (nýprísur 4.945) Um hetta hevur tín áhuga
*ring 218414*

**FRYDENSBERG-SAMLING**
Kjell Nielsen lærari á Fryd kemur til Føroya og vil fegin møta næmingum ið hava gingið á Frydskúlanum í Mariager. Vit møtast til eina hugnaliga samveru.Taki myndir o.a. við. dato og stað: 18. mai kl.15:00 í Filadelfia í Havn. Tilmelding hjá Janus Kannuberg á tlf. 260989 / 447708
*Vit síggjast!*

**PLANTUR TIL SØLU**
Olearia-runnar til girðing, jarðber og staudir til sølu.
*Tlf. 448271*

**SÍL**
Nú taka tey aftur – sílini á Nesvatni. Altið nøkur stór síl í vatninum (1-3 kg). Kostnaður pr. tráðu pr. dag 175 kr.
*Tlf. 447565 - 260887*

**NAKAÐ AV HOYGGI**
til sølu.
*Tlf. 444781*

**SONY ERICSSON T68i**
Hevur bluetooth, innbygt modem, mms, e-post og mangt annað. Nýprísur 5.190 kr., til sølu fyri 4.500 kr.
*Tlf. 211680*

**MÁLNINGUR**
Málningur av S. J. Mikines til sølu. Stødd 88 b x 70 h
*Tlf. 313245 ella 213245*

**TIL SØLU**
AB-doer + videoband til sølu fyri 700 kr. Nýprísur 1200 kr.
*Tlf. 314538*

**TIL SØLU**
Eitt Minolta 505si v/ 2 linsum og tasku.
*Tlf. 456231*

**FARTELEFON TIL SØLU**
Ein svert Siemens C35i, í góðum standi, er til sølu fyri 600 kr. Hon er 1/2 ára gomul. Fæst eftir kl. 16.
*Tlf. 261164*

**TIL SØLU**
Nokia mobiltelefon 7110 til sølu fyri 2.000 kr. við ladara og tilhoyri.
*Tlf. 321444, e. kl. 17.30*

**SPLATGUN**
Ein lítið brúkt heilautomatisk MP 5 splatgun við allari útgerð til sølu fyri 2900 krónur. Við fylgir ladari, battarí, eyka magasin, sum tekur 200 kúlur, og trygdarmaska. Eykakúlur kunnu keypast í Føroyum. Nýprísur 3925 krónur.
*Tlf. 322800 ella 223143*

**TIL SØLU**
Opin/lukka peis til sølu fyri 8.000 kr. kann tillukkast radiatoranlegg.
*Tlf. 226315/317414*

**ERICSSON T10 TIL SØLU**
Telefonin er næstan einki brúkt, tað fylgir eitt chat board við, telefonin er opin og kann brúkast við øllum telefon/sim - kortum. Eitt sera gott keyp, ring ella send ein mail. Kostnaður kr. 450,-
*Tlf. 374059 e-Mail: radey@kallnet.fo*

**JØRÐ TIL SØLU**
í Norðdepli um hóskandi boð fæst.
*Tlf. 225249*

**DVD-FILMAR**
Dinosaur, R2, kr. 170,-. Toy Story 2, R2, kr. 170,-. Keyp báðar fyri kr. 300,-.
*Tlf. 265052*

**FARTELEFON**
NOKIA 3310 til sølu fyri 800 kr.. Lithium battarí, chat-funktón, SMS, vibrator. Brúkt, uml 1 ára gomul.
*Tlf. 256757 - 310070*

**TIL SØLU**
Stativ til myndatól og videokamera. Óbrúkt "DÖRR Danubia stativ mini 2000" til sølu. Kompakt 29 cm., útfoldað 66 cm. við "3 veg bend" høvdi. Keypsprísur 400, til sølu fyri 300 kr.
*Tlf. 260590*

**GÓÐ VINDEYGU**
1 sprossavindeyga120 X 130 cm, 2 vindeygu u/ sprossar 100 X 70 cm, 1 vindeyga u/ sprossar 100 X 90 cm
*Tlf. 421670/243721*

**TIL SØLU**
Nokia 3210 fartelefon til sølu fyri 600 kr.
*Tlf. 264403 - 315397*

**DUPULT ÚTHURÐ**
Nýggj dupult úthurð v/ termo sprossarútum til sølu.
*Tlf. 311612*


**AMBOÐ**
- Tvangsblandarir
- Blandimaskinur
- Glittemaskinur
- Bjálkavibrator
- Stavivibrator
- Betongslípimaskinur

og mangt annað
**Søla & útleigan**
Kaj Andreasen & Co
T. l. 315600 á 31 00



**BESTA MÁLINGIN TIL HÚSIÐ**
**máling & gólv**
**JOHNSTONE'S TRÆVERJA**
SERA HALDGÓÐ
Tolir væl okkara harðføra veðurlag
5 l. 399 kr.
**STORMSHIELD BETON MÁLING**
Royndir vísa hon heldur í 15 ár
10 l. 549 kr.
**máling & gólv**
við Landavegin
Tlf. 316066


**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. P/F 1927, P/F Hotel Føroyar, 100 Tórshavn.
Viðtøkur broyttar: 26.02.2002.
Nevnd:
Farin úr nevndini: Olina Winther Djurhuus, Tjarnarlá 39, 100 Tórshavn (formaður) og Ingrid Lis Eklund Jensen Tjóhildargøta 11, 100 Tórshavn.
Innkomin í nevndina: Tórmóður Djurhuus, Hvítanesvegur 19, 188 Hoyvík (formaður), Heðin Klæmint Weihe, Marknagilsvegur 64, 100 Tórshavn (næstformaður) og Jóannes á Váli, Marknagilsvegur 12, 100 Tórshavn.
Tekningarreglur: Felagið verður teknað av nevndarformanninum saman við einum stjóra ella av nevndarformanninum saman við einum øðrum nevndarlim ella av allari nevndini.

Skráseting Føroya tann 6. mai 2002

Kristin Balle


i
Sosialurin

**Góða Tóra mostir**
Vit ynskja tær hjartaliga tillukku við 34 ára føðingardegnum tann 9. mai. Her sært tú so gott út! Klár at fara út við tráðuni! Ha, ha, ha. Hav tað nú so gott.
**Heilsan, vit øll Markus**

**Heilsanir** 30,- kr. Sosialurin

**5 ferðir um vikuna**

**Gevið gætur**

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við 30,- kr. fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.

**Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á miðdegi 2 dagar fyri útkomudag.** Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.
☐ Týsd. ☐ Mikud. ☐ Hósd. ☐ Fríggjad. ☐Leygard.

Tekstur:.....
.....
.....
.....
.....
.....

**Myndina aftur:** Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.
Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).
Navn: .....
Bústaður: .....
Bygd/býur: ..... Tlf.: .....

Sendið lepan, mynd og gjald til:
**Sosialurin**
Postsmoga 76 •110 Tórshavn
Merkið bjálvan: »**Heilsanir**«



# TILTØK

**Gudstænastur**
**Kristi himmalferðardag**
*Havnar kirkja:* kl. 11, prestainnsetan, Bjarni Bæk innsetur Henning Nielsen
*(Talvan gongur í Suðurstreymoyar eystara prestagjaldi fyri Kirkjuliga Missiónsfelagið)*
*Vesturkirkjan:* kl. 11 Heri J. Joensen. *(Talvan gongur fyri Heidningamissiónina hjá Kirkjuliga Missiónsfelagnum).*
*Kirkjuburur:* kl. 12.15 Heri J. Joensen
*Argja kirkja:* kl. 11 Bergur D. Joensen, altarg. *(Talvan gongur fyri Heidningamissiónina hjá Kirkjuliga Missiónsfelagnum).*
*Gøta:* kl. 11 Martin R. Jacobsen
*Haldarsvík:* kl. 16, sanggudstænasta, har kóríð í Friðriksskirkjuni luttekur. *(Í Nes prestagjaldi gongur talvan fyri Ytri Mission hjá Kirkjuliga Missiónsfelagnum)*
*Eiði:* kl. 10.40 skriftamál, kl. 11 messa, Emil Olsen. *(Talvan gongur í øllum kirkjum í Eiðis prestagjaldi fyri Føroysku Heidningamissiónina hjá Kirkjuliga Missiónsfelagnum)*
*Sandavágur:* kl. 11, David Johannesen. *(Talvan gongur í Vága Prestagjaldi fyri Føroysku Heidningamissiónina)*
*Kollafjørður:* kl. 11, altarg., Marjun Bæk
*Tjørnuvík:* kl. 12, Inga Poulsen Dam. *(Í Kvívíkar og Kollafjarðar kirkjum gongur talvan fyri Kirkjuliga Missiónsfelagið, í Vestmanna fyri Sjómansmissiónina)*
*Christianskirkjan:* kl. 11, Hans Eiler Hammer
*Haraldssund:* kl. 11, Niels Pauli Danielsen
*Oyndarfjørður:* kl. 12, altarg., Jógvan Friðriksson. *(Í Sjóvar prestagjaldi gongur talvan fyri Kirkjuliga Missiónsfelagið)*
*Fuglafjørður:* kl. 11, Uni Næs. *(Í Fuglafjarðar prestagjaldi gongur talvan fyri kristniboðan hjá Kirkjuliga Missiónsfelagnum)*
*Fámjin:* kl. 12, altarg., Jónsvein Bech
*Dalur:* kl. 12, Jákup Reinert Hansen. *(Talvan gongur í Sandoyar prestagjaldi fyri Heidningamissiónina)*
*Vágur:* kl. 11, Marianne Telling. *(Innsavnan fyri Kirkjuliga Missiónsfelagið). Talvan gongur í* ***Norðoya eystara prestagjaldi*** *til frama fyri Føroysku Heidningamissiónina undir Kirkjuliga Missiónsfelagnum.*

*Porkeris kirkja: Kristi himmalferðardag gongur talvan fyri kirkjuligu Heimamissiónina.*

**Meinigheitin í Hoyvík**
*uppi á Brekku 3*
Sunnudagin kl. 18 møti v/ Osbjørn Joensen.
Mánakvøldið kl. 20.30 Bønarmøti.
Sunnudagsskúlin kl. 14 er í Hoyvíkar skúla.

**Frelsunarherurin, Tórshavn**
Sunnudagin kl. 11 Møti, kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti, Steintór og Thorbjørn og onnur úr Hoyvík luttaka á báðum møtum.

**Hebron, Argir**
Friggjadagin kl. 21 Ungdómsfundur, Jógvan Zachariassen talar.
Sunnudagin kl. 10.30 Breyðbróting (skipað barnaansing). Kl. 12 Sunnudagsskúli, kl. 18 Missiónsmøti – videofilmur verður vístur. Heimasíða okkara www.hebron.fo

**Adventkirkjan**
Leygardagin kl. 10 Barnabíbliutími og bíbliugransking. Evni: Bótardagurin í endatíðini. Kl. 11 Gudstænasta, Thornbjørn Brochs.

**Kirkju- og Missiónshúsið á Argjum**
Kristi himmalferðardag kl. 20 Møti v/ Mourits Mouritsen.

**Meinigheitshúsið**
Kristi himmalsferðardag kl. 18 Møti v. Thomas Thomasen.
Leygarkvøldið kl. 19.30-22 Juniorhugni fyri 6. flokk og eldri.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti v. Steen Palmqvist.
Mánakvøldið kl. 20 venur Manskórið.

**Katólska kirkjan**
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 Messa í Kerit.
Hósdagin Kristi himmalaferð, hámessa kl. 11 v/ Martin de Leur í Mariukirkjuni.
Leygardagin kl. 11.30 Messa í Kerit.
Sunnudagin kl. 11 Hámessa v/ Martin de Leur í Mariukirkjuni.
Eingin sunnudagssskúli verður, men ístaðin verður kórsangur kl. 14 við Argjakórinum, har tit eisini eru hjartaliga vælkomin.

**Filadelfia, Landavegur 22**
Í annaðkvøld kl. 20 Ungdómsmøti.
Leygardagin kl. 17 Landsbøn.
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti v/ Hanne og Egon Falk, kl. 11.30 Barnagudstænasta, kl. 18 Kvøldmøti v/ Tummas Jacobsen.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarskúlin.
Møtiskráin hjá Filadelfia sæst á heimasíðu okkara: www.filadelfia.fo

**Samkoman Immanuel**
Fríggjakvøldið kl. 20 Kongsins Herlið, 8 ár og eldri eru vælkomin.

**Hvítusunnusamkoman**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11 morgunmøti, kl. 18: Evangeliskt møti. Øll eru vælkomin.

**Saron, Vestmanna**
Kristi himmalsferðardag kl. 11 Morgunmøti, kl. 18 Evangel. møti.
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti, Orla Lindenskov Christensen talar á møtinum.
Telefonandaktin 424 741.

**Feladelfia, Sundalagi**
Í kvøld kl. 18-20 Urtagarðurin – eitt trivnaðarstað fyri børn.
Í annaðkvøld kl. 20 Møti v/ Orla Lindskov.
Leygarkvøldið kl. 20 Møti í Eydnuni á Oyrabakka v/ Orla Lindskov.

**Leguhúsið í Nesvík**
Felagsmissiónsvikan heldur áfram í Nesvík. Kl. 17.30 Bønarmøti, kl. 18 Møti við Torleif Johannesen og kl. 21 eru tiltøk fyri tey ungu.
Í morgin kl. 19 Bønarmøti, kl. 19.30 Møti við manskórinum úr Meinigheitshúsinum í Havn við talu og sangi.

**Keldan, Skálafirði**
Mikukvøldið kl. 20.30 møtast húsbólkarnir í Kelduni.
Hósdagin – Kristi himmalferðardag kl. 19 Møti við ungdómi frá skúlanum í Mariager.
Leygarkvøldið kl. 21 Opið hús.
Sunnudagin kl. 16 Familjumøti í Ítróttarhøllini á Skála.
Bønarmøti hvørt mánakvøld kl. 19-20. Tú ert vælkomin í Kelduna.

**Aglow-møti**
verður í Hæddini í Runavík við Jonnu og Palla Højgård leygardagin kl. 15. Allar kvinnur og menn eru hjartaliga vælkomin.

**Thabor, Fuglafjørður**
Sangmøti verður Kristi himmalferðardag kl. 18. Barnakórið og Thaborkórið syngja. Innsavnan.
Sunnudagin kl. 13.30 Sunnudagsskúli. Kl. 18 Møti og ungdómsmøti við Finn Johannesen kl. 21.

**Soli Deo Gloria**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti.
Mánadagin kl. 20 Bønarmøti.

**Aglow, Klaksvík**
Møti verður á Soli Deo Gloria týskvøldið 14. mai kl. 20.00 Sanna Hammer tosar. Allar kvinnur eru hjartaliga vælkomnar.

**Missiónshúsið í Skopun**
Sunnudagin kl. 15 Familjumøti. Kakao og bollar verður at fáa aftaná. Hjartaliga vælkomin. Einki møti um kvøldið vegna møti á Sandi.

**Missiónshúsið á Tvøroyri**
Fríggjakvøldið kl. 21 Ungdómsmøti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Frelsunarherurin, Vágur**
Árasøla við nógvum til burturlutingar verður í Framtíðini í Vági kl. 19.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti.
Mánadagin kl. 20 Heimaforbundið – fyri allar kvinnur.

**Betel, Vágur**
Kristi himmalferðardag kl. 18 Evangel. fundur.

**Dagtilhaldið í Vági**
Dagtilhaldið er opið týsdag og hósdag frá kl. 15.00-18.00. Øll eru vælkomin.

**Dagtilhaldið Fløvin**
heldur til í húsinum hjá Kongshavnar Kvinnufelag. Opið er mánadag-fríggjadag frá kl. 15.00-18.00. Allir pensionistar eru vælkomnir.

**Reyði Krossur Føroya**
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 212380. Kennir tú føroying í Keypmannahavn, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10, 100 Tórshavn
tlf. 319630/61655400.

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag kl. 10-18. Týsdag-fríggjadag kl. 10-17. Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
*Mánadagin 6. mai*
kl. 9.45-10.15 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 10.15-18 Vit gera grýtulappar. Seyma teppir saman
kl. 14-18 Kort- og bobbspæl, telving, dart og onnur spøl. Tilm. til døgurðan mikudagin tlf. 316491
*Týsdagin 7. mai*
kl. 10-12 Vit baka
kl. 10-11.30 Sangur, Jóhan R. Jacobsen. Øll eru hjartaliga vælkomin
kl. 15 Gamli maðurin og varðin, Martin Joensen. Ívar Iversen lesur.
*Mikudagin 8. mai*
kl. 10-13 Matgerð
kl. 12 Døgurði
kl. 15 Túrur niðan á Húsareyn. Farið verður við bussi.
*Hósdagin 9. mai*
**Kristi Himmalsferðardagur – stongt.**
*Fríggjadagin 10. mai*
kl. 10-17 Opið hús

Tað er altið ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.

**Felagið Tórshavn – gongutúrur**
Kristi himmalferðardag 9. mai verður gongutúrur: Hellurnar, Góðadal, Halgadal. Farið verður av Kunningarstovuni kl. 10.30. Túrurin er tungur og langur, og gingið verður í brattlendi. Havið heit og góð gonguklæði og ein matpakka við. Tilmelding.

**Náttarravnarnir í Tórshavn**
Tín stuðul ger mun! Blív limur ella gang ein royndartúr. Ringið Carl 215570, Guðrið 220019, Hans Jákup 217818, Tone 261165, Ella 316261, Arni 222552.

**AA-fundir í Havn**
Reinsarið, Tórsgøta 5:
Fundur verður í kvøld kl. 20-21.
Heimasíða:
http://heima.olivant.fo/~aa-fo/

**AA-fundur í Eysturoy**
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan.
Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla læraraíbúðin).

**AA-fundir í Vágum**
Í gamla skúla í Sandavági hvørt hóskvøld og leygarkvøld kl. 19.00 (á loftinum, inngongd niðanfyri).

**AA-Suðuroy**
AA-fundirnir í gomlu læknamiðstøðini á Tvøroyri eru fríggjakvøld kl. 21.00 og sunnudag kl. 15.00.

**Blái Krossur – Glyvrar**
bjóðar til eftirviðgerðarfund hvørt mánakvøld kl. 19 í hølunum hjá Bláa Krossi á Glyvrum.

**Blái Krossur – Eiði**
bjóðar til eftirviðgerð í Losjuni á Eiði annaðhvørt týskvøld kl. 20. Meira fæst at vita á tlf. 315575.

**Føroya Heimavirksfelag**
Postboks 1209 - 110 Tórshavn.
Teldupostur: fhf@craft.fo
Heimasíða: www.craft.fo
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst við at ringja til formannin: Nigro Hermansen tlf. 314304 / fartlf. 288304.

**LFÚ-skrivstovan**
hevur opið týsdag og hósdag millum kl. 11 og 16.
LFÚ-ráðgevingin hevur opið týsdag og hósdag frá kl. 16-18.

**LISA**
skrivstovan hjá Listafólkasambandi Føroya í Dj. í Geilsgøtu 1 er opin allar gerandisdagar frá kl. 9.00-12.00.
Telefon: 310197.
Teldupostadressa: lisa@lisa.fo – heimasíða www.lisa.fo

**MÁF**
(Meginfelag Áhugaleikara Føroya)
heldur til í húsum Hans Andrias Djurhuusar undir Pisuvarða 2, Tórshavn
Tlf. 315624, Faks 315924,
e-mail: maf@maf.fo
Heimasíða: www.maf.fo
Opið er: má. og tý. kl. 10-15, mi. kl. 13-18, hó. og fr. kl. 10-15.
Endamál felagsins er at stuðla áhugaleiklist og menna hesa mentunargrein í Føroym. 16 sjónleikarafeløg eru limir í MÁF.
Formaður: Hilmar Joensen, Nólsoy. Dagl. leiðari: Malan Matras Joensen.

**Kvinnuhúsið**
svarar alt samdøgrið á tlf. 317200. Skrivstovan er opin frá kl. 10 til 17, og hósdagar til kl. 21. Ráðgevingin er hóskvøld eftir avtalu.

**Amnesty International, Føroya deild**
Tinghúsvegur 18, 4. hædd
Tlf. 315816
Heimasíðan: www.amnesty.fo
Teldupost:
Amnesty-Amnesty.fo
Skrivstovan er opin:
Mánadag frá kl. 13–17 og mikudag frá kl. 9.30-17.30.

**Føroyskir fiskimenn uttanlands**
tlf. 21 04 95.
Felagið fyri føroyskar fiskimenn í Canada, Svoríki, Danmark, Íslandi og Noregi.
Limagjald 200 kr. um árið.
Postgiro 57894. Fø.
Sparikassi 442027-8.

**MBF**
Íslandsvegur 10C
100 Tórshavn
Skrivstovan er opin allar gerandisdagar millum kl. 9.00 og 16.00.
Tlf. 317373 · Fax 310813
T-post: mbf@post.olivant.fo

**Giktafelag Føroya**
Íslandsvegur 10 C
100 Tórshavn
Tlf. 310237 · Fax 310813
T-postur: gikt@post.olivant.fo
Skrivstovan er opin týs- og hósdag frá kl. 11-14.
Fibromyalgibólkurin hevur opið mánadag frá kl. 11-13.

**Lymfødemfelagið**
Box 2113, FO 165 Argir
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð. Samband fæst við felagið á tlf. 448454, Fía í Túni, ella tlf. 313424, Arnhild Johannesen.

**Javni**
Hoydalsvegur 40
3. hædd (ovast).
Skrivstovan er opin týs-, miku- og hósdag kl. 9-12.
Fríggjadag kl. 13-16.
Tlf. 314827 · fax 310557
email: javni@post.olivant.fo

## KONFIRMATIÓN

**Sunnudagin 12. mai 2002 í Nólsoyar kirkju**

Ulla Poulsen
Amanda Hansen
Jacoba Juulsdóttir Jacobsen

Sunnudagin 12. mai verður Hjalmar Reynstind, konfirmeraður í Lindehøj kirkju í Herlev.

18. mai verður Christina Reinhardt, dóttur Elin og Ole Reinhardt konfirmerað í Lindehøj kirkju í Herlev.

## 90 ÁR

Kristi himmalferðardag 9. mai fyllir Kaja Arge 90 ár. Føðingardagurin verður hildin á Lágargarði millum kl. 15.00 og 18.00.

## BRÚDLEYP

Í dag, 9. mai kl. 14.30 giftast í Vestmanna kirkju Eydgerð Hentze, Skopun og Marner Sonni Joensen, Vestmanna.

Leygardagin 11. mai kl. 16.00 giftast í Glyvra kirkju Elin Sigmundardóttir Hammer og Jákup Øster Vágsheyg, Glyvrar. Veitslan verður fyri innbodnum í Bygdarhúsinum í Leirvík.

Leygardagin 11. mai kl. 15.00 giftast í Hørsholm kirkju Anja Mortensen, Havn og Torben B. Hansen. Adr.: Ahornvej 44, 2970 Hørsholm. Brúdleypið verður hildið fyri innbodnum.